



Papyrus-handritið til Judas-evangeliið varð funnið í eini holu í Egyptalandi



Papyrus-rullurnar avdúka eina nýggja síðu í sambandinum millum Jesus og Judas



Í Judasevangeli'inum verður Judas Iskarjot roknaður sum ein hetja, av tí at hann í mun til hinar lærusveinarnar hjá Jesusi, er tann einasti, ið skilir boðskapin hjá Jesusi til fulnar.

# Judas-evangeliið er ikki eitt evangeliið

**– Hetta evangeliið er heldur ikki skrivað av Judasi, sigur Jógvan Zachariassen úr samkomuni Lívdini í Hoyvík**

JUDAS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Jógvan Zachariassen slær í stuttari viðmerking fast, at sum eitt søguligt handrit er Judasar evangelium hóast alt sera umráðandi.

– Tað kastar ljós á tann gnostiska litteraturin, sum var í ringrás í 2. øld eftir Kristi føðing, sigur hann.

Hann vísir á, at tilsamans eru 21 sokallað gnostisk "evangelium" funnin.

– Felagsnevnarin er tann, at tey øll stríða móti læruni í teimum fýra evangeliunum hjá Matteusi, Markusi, Lukasi og Jóhannusi.

Judasar evangelium er ikki eitt evangelium og er heldur ikki skrivað av Judasi.

– Tað sigur okkum líka lítið um sambandið millum Jesus og Judas, sum "Jesus Christ Superstar" hjá Andrew Lloyd Webber og Tim Rice, gjørdi.

– Í Judasar evengeliunum verður tann nógv hataði Judas settur í eitt gott ljós. Her verður svíkjarin gjørdur til mannin, ið hjálpti sál Jesusar at verða loysta úr likamliga fangahúsi sínum, sigur Jógvan Zachariassen at enda.



*Jógvan Zachariassen er sannførdur um, at Judasar evangeliið stríðir móti*

# Mugu kenna innihaldið fyrst

**Ikki er lætt at fáa viðmerkingar til nýggju tíðindini um sonevnda Judas-evangeliið. Fólk ynskja at kenna innihaldið fyrst.**

JUDAS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Vit hava verið í samband við fleiri persónar, men teir ynskja ikki at gera viðmerkingar til málið, tí innihaldið er teimum ikki kunnugt.

Hinvegin tók Bergur D. Joensen, prestur nakað av hesum nýggja tilfarinum fram í prædiku síni í gjár.

Hesa prædikuna hevði alt Føroya fólk høvið at hoyra, tí hon varð send beinleiðis í útvarpinum.

Víst varð m.a. til eina grein á heimasíðuni hjá Føroysku Ísraels-missiónini, har ein norskur professari sigur sína hugsan um hetta málið.

Henda greinin ber heitið "Judas evangelium vikar ikki kristnu trúnna"

## Ein eind

Sjónvarpsrásin National Geographic vísti annars í gjárkvøldið eina sending, har hesin nýggi fundurin varð umrøddur.

Her varð m.a. víst á, at í hesum skriftinum verður víst á, at Jesus og Judas gjørdu eina avtalu um forløpið í viðurskiftunum teirra millum.

Nevnt varð, at her var helst talan um avtalað spæl teirra millum.

Annars nýtti sendingin nógva tíð at vísa fram, hvussu ein reint tekniskt hevði arbeitt við at seta pettini í hesum gomlu skjølunum saman.

Tey eru nú sett so mikið saman sum til eina eind, at nú ber til at fáa ein samanhang í hetta evangeliið.